# Danmarks Radio stóran áhuga fyri Føroyum



*Anton Gammelgaard og hansara myndamaður hava ferðast runt í Føroyum saman við Rolf Guttesen og Sjúrði Skaale, sum skulu duelera um ymisk viðurskifti innan føroyska søgu*

**Heili seks frá frá Danmarks Radio vitja í Føroyum í løtuni. Ætlanin er at tvær heilt ymiskar sendingar skulu spyrjast burturúr**

SENDINGAR
*Heri á Rógvi*

Áhugin fyri Føroyum í donsku fjølmiðlunum er eitt sindur skiftandi, men nú tykist av álvara at vera komin vend í.

Í løtuni eru ikki færri enn seks frá Danmarks Radio í Føroyum. Ørindini eru at gera sjónvarpssendingar. Fýra mans fáast við at gera eina sending, sum fyribils koyrir undir arbeiðsheitinum »Rigsfælleskapet«. Hin sendingin er til DR 2, og er talan um eina sending í einari røð av sendingum, sum viðgera ymisk søgulig evni.

Sendingin »Rigsfællesskabet« kemur at snúgva seg um tað modernaða føroyska samfelagið, soleiðis sum tað sær út í dag. Eisini er ein líknandi sending gjørd um Grønland.

– Ætlanin er at gera eina so góða og greiða frágreiðing frá tí modernaða føroyska samfelagnum sum gjørligt. Ætlanin er at nýta góðar myndir og hoyra frá tí »vanliga« manninum, sigur Henning Olsson, sum til dagligt er politiskur redaktør á Christiansborg fyri Danmarks Radio.

Sendingin kemur at vera ein hálvan tíma til longdar, og er sendingin stíla sum ein feature reportasja.

– Vit hava verið kring oyggjarnar, og vit hava sæð, at tað er meira í tí føroyska samfelagnum enn bara spurningurin um sjálvstýri, eitt nú oljan er sera spennandi, sigur Henning Olsson.

Teir hava leingi havt ætlanir um at gera hesar sendingarnar, men orsaka av avlýstu fólkaatkvøðuni eru teir ikki komnir fyrr enn nú.

Henning sigur seg vænta, at sendingin verður send innan ársskifti.

Hin sendingin, sum verður gjørd í løtuni skal sendast á DR 2. Sendingin er partur av einari røð. Í sendingunum verða ymisk tema tikin upp úr søguni, og nú var túrurin komin til at vitja Føroyar. Tað er Anton Gammelgaard, sum stílar fyri sendingini.

Sendingin er skipað soleiðis, at tvær duelantar siga sína útlegging av ymiskum málum innan søguni. Í hesum førinum eru tað Sjúrður Skaale og Rolf Guttesen, sum siga frá sínari útleggingini av søguni viðvíkjandi spurningum um tey ríkisrættarligu viðurskifti. Tað er kanska óneyðugt at siga, at tað er Sjúrður Skaale, sum sigur frá teimum loysingarsinnaðu sjónarmiðunum, og Rolf Guttesen hevur eina meira sambandssinnaðu útlegging.

Eisini hava teir báðir hvør sítt vitni. Rolf Guttesen nýtir Anju Andreasen, søgufrøðing, og Sjúrður hevur leitað sær hjálp frá einum íslendskum professara í Svøríki.

Sendingin verður send í viku 43 á DR 2.

# Tey snýta hvønn annan upp úr skónum

**Í kvøld verður nýggjasta uppsetingin hjá Grímu framførd fyri fyrstu ferð. Leikstjórin lovar ein skemtiligan leik fyri øll**

SJÓNLEIKUR
*Heri á Rógvi*

Tað er ikki lítið av virksemi á gamla Meiarínum. Síðani húsið fór at virka sum eitt slag av leik- og mentunarhúsið hevur eitt sindur av hvørjum verið at síggja og hoyra í húsinum. Serliga sjónleikurin »Eitur nakað land weekend« vakti ans millum føroyingar, sum í hópatali vitjaðu sýningarnar. Ætlanin er, at umframt henda sjónleikin skal ein sjónleikur afturat framførast áðrenn ársskiftið. Februar mánað komandi ár stendur einki minni enn Macbeth á skránni. Tað verður ein leikur við leikarum úr fleiri londum.



*Tað verður reinur ørskapur, tá Gríma í kvøld fer á pallin við teirra nýggja sjónleiki, Fótur í hosu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Seinastu vikurnar hava flestu leikararnir hjá Grímu vant ein nýggjan føroyskan sjónleik. Sjónleikurin eitur »Fótur í hosu«. Slagið er kanska ikki tað, ið vit í Føroyum hava sæð mest til, men hetta er tó heldur ikki fyrstu ferð, at hetta slagið av sjónleiki verður skrivað og framført í Føroyum.

Slagið tosað verður um er glantrileikur ella farsa. Hetta er fyri so vítt eitt slag av skemtileiki. Leikurin byggir fyri so vítt eisini á nógv og gott skemt, siga fyrireikararnir.

Tað eru systkini Hans og Súsanna Tórgarð, sum hava skrivað leikin. Tað var eftir, at tey vóru á einum skeiðI hjá Eyðun Johannesen og Jørgen Ljungdahl, har tey lærdu eitt sindur um at skriva sjónleik. Burturúr hesum skeiðinum spurdist ein so mikið spennandi sena, sum tey bæðI síðani valdu at arbeiða víðari við, og úrslitið gjørdist so hesin nýggi leikurin, Fótur í hosu. Tað tók tó bert eina viku at skriva leikin, men tá varð eisini arbeitt bæði nátt og dag. Leikurin var eisini við í leikrita kappingini hjá Leikpalli Føroya, men leikurin varð ikki skrivaður við hesum fyri eyga, sigur Hans Tórgarð.

Søgan í leikinum snýr seg um, at systkini Jákup og Maritu og ein danskur hýruvognsførari finna tvær avskornar føtur. Hetta verður beinanvegin sett í samband við Bankastjóran, og skjótt endar alt í einum ruðuleika. Leikurin líkist eisini einum krimileiki í nógvar mátar, og leikurin er eisini vorðin kallaður fyri eina krimifarsu.

Hóast leikurin er ógvuliga skemtiligur, so skortar tað heldur ikki við samfelagskritikki. Leikstjórin, Hans Tórgarð, undirstrikar tó, at eingin verður beinleiðis hermdur eftir í leikinum, men heldur eru tað nakra typur, sum verða fluttar á pall. Fólk kunnu tó gjarna kenna seg rakt, sigur leikstjórin.

Leikurin fer eisini fram í nútíðarsamfelagnum, og staðið er Havnin. Persónarnir í leikinum eru sum áður nevnt kendar typur, ið fólk óivað fara at kenna aftur.

Tað er sum áður nevnt Hans og Súsanna Tórgarð, sum hava skrivað leikritið. Sjálvur hevur Hans Tórgarð eisini leikstjórna henda leikin. Hetta við at tað nú er hann, sum leikstjórnar, er ikki nakað óvanligt hjá Grímu, tí tey eru so von við at skiftast um uppgávur, sigur Hans Tórgarð. Ein onnur Tórgarð spælir eisini við í leikinum, Ria Tórgarð. Tveir av teimum, sum eisini sluppu framat í "Eitur nakað land weekend" eru eisini við hesaferð. Talan er um Høgna Johansen og Kára Øster. Eisini spæla Egi Dam, Kristina Hansen, Aksel Joensen og Birita Mohr við í sjónleikinum.

Frumsýningin verður í kvøld kl. Og spælt verður á Meiarínum eina tíð fram. Ætlanini er eisini at fara at ferðast við leikinum.

# ítróttur

Nr. 188 • leygardagur • 29. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Móttøka í Havn

**Býráðið í Havn skipar fyri móttøka í gamla kommunuskúlagarðinum leygarkvøldið**

Tað verða óivað nógv viðhaldsfólk hjá B36, sum leygardagin fara suður til Vágs at hyggja at landskappingardystinum millum VB og B36.

Tá ið Smyril kemur norðuraftur til Havnar, um hálvgum átta tíðina leygarkvøldið, verður skipað fyri móttøku at heiðra føroyameistarunum í 1. deild í fótbólti. Byrjað verður á havnaøkinum, har harmoniorkestrið GHM fer at spæla.

Eftir at leikarar og viðhaldsfólk eru komin í land, verður farið í skrúðgongu við GHM á odda niðan í gamla kommunuskúlagarðin, har býráðsformaðurin, Jan Christiansen, tekur ímóti B36 leikarunum og fer at flyta fram røðu. Eisini fer formaðurin í B36, Kristian á Neystabø, at halda røðu.

# B36 hevur skreytið við til Vágs

**Í Vági halda teir tað ikki vera nóg gott, at teir í síðsta umfarinum ikki skulu stríðast um meiri enn bronsuna**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Føroyameistararnir og steypavinnararnir úr B36 fara seinnapartin í dag at fáa gullkrónur og Føroya Bjór steypið handað á Vágs eiði. So verður farið norður aftur til Havnar við Smyrli, og tað verður gjørt ikki so lítið burturúr. Ársveitslan verður leygardagin 13. oktober, men tað verður høvi at heilsa upp á spælararnar í kvøld. Tá B36 ferðalagið verður aftur í Havnini, fer Tórshavnar býráð at taka ímóti teimum. Bæði tá B36 var FM vinnari í 1997, og tá HB var FM vinnari í 1998, handaði býráðsformaðurin kekk á trappuni frammanfyri gamla kommunuskúlan ella umsitingarbygningin hjá býráðnum, og soleiðis verður tað ivaleyst eisini hesa ferð.

Tað hevur verið roknað við, at nógv B36 viðhaldsfólk skuldu til Vágs at fylgja við. Ætlanin var, at spælararnir skuldu fara suður fyrrapartin í dag. Men tann ætlanin varð broytt mitt í vikuni. Veðurmaðurin boðaði frá landssynningi. Tað er ringasta ætt, og tí skuldi B36 liðið fara suður í gjárkvøldið.

### Liðformaðurin ivasamur

Tað er greitt, at Bjarni Prior ikki verður á FM liðnum í dag. Hann fekk ímóti HB triðja gula kortið og er tískil leikbannaður. Tað er eisini greitt, at Pól Thorsteinsson verður við ímóti gomlu liðfeløgunum í VB. Hann var leikbannaður síðsta sunnudag.

Ímóti HB noyddist Jákup á Borg tíðliga at taka seg av vøllinum. Hann hevði fingið tað, teir kalla eitt



*John Petersen sleppur í dag at taka ímóti FM-steypinum*

trælær, men nú er alt í lagi aftur. Liðformaðurin hjá B36 eitur John Petersen. Tað verður hann, sum skal taka ímóti FM steypinum í dag. Men í gjár var eitt sindur ivasamt, hvussu væl hann verður førur fyri at spæla. Ímóti HB var tað týðuligt, at John hevði trupulleikar við beininum, og tað hevur hann enn.

Tá B36 ólavsøkudag vann finaluna um løgmanssteypið, varð eingin mynd tikin. Veðrið var so vánaligt, at illa komnu spælararnir skundaðu sær undir tak. Men teir hava tikið løgmanssteypið við suður til Vágs, so tað verður á myndini, sum verður í blaðnum týsdagin.

### Ikki nóg nógv

Í fjør vóru tað vágbingar, sum í Gundadali vórðu fagnaðir sum meistarar, meðan teir í B36 vóru eygnavitni til rómin. Í dag eru leiklutirnir býttir um.

Og tað er einki at liggja omaná, at teir í Vági iðra seg um, at tað bara er møguleiki hjá teimum at vinna bronsu krónurnar:

– Vit hava fleiri ferðir spilt okkum so rudduliga burtur. Í Miðvági vóru vit á odda 2–0, tá bara átta minuttir vóru eftir, men kortini taptu við 3–2. KÍ hevur ikki verið væl fyri í ár, men kortini hava vit tapt báðar dystirnar ímóti teimum. Serliga tapið á heimavølli var sera harmuligt, tí tá áttu vit alt spælið.

Hetta sigur Kári Poulsen, sum er liðleiðari hjá VB, og sum tískil hevur fylgt liðnum alt árið.

Nú vóna bæði liðleiðarin og øll onnur, sum eru góð við VB, at KÍ fer at gera sítt:

– Um vit skulu fáa fatur á bronsukrónunum og harvið á Intertoto Cup plássinum, so skulu vit vinna á B36. Vit rokna avgjørt við, at tað er møguleiki fyri tí, nú B36 ikki skal stríðast fyri meistaraskapinum. Men um roknistykkið hjá okkum skal ganga upp, so skal KÍ vinna á B68. Tað vóna vit, at teir fara at gera.

Endar tað soleiðis, sum vágbingarnir vóna, so fer at standa á jøvnum í stigum ímillum B68 og VB, men vágbingar fara at fáa bronsuna, tí teir hava staðið seg betri í innanhýsis dystunum. Á Toftum vann VB í 2. umfari 4–1, og í 11. umfarinum endaði tað 1–1, tá B68 var í Vági.

Hjá VB eru allir spælararnir tøkir, sum hava verið við tær seinastu ferðirnar. Hetta verður seinasti dysturin hjá Popczynski á VB liðnum. Komandi kappingarár skal maðurin, sum var tann fyrsti at gera VB til meistarar, spæla við gøtumonnum.

Tá B36 og VB í 9. umfarinum tókust í Gundadali, endaði B36 omaná. Úrslitið var 3–2.